## Nýggjur býarpartur í framtíðini



**Klaksvík:** Tað hevur verið trupult hjá Klaksvíkar kommunu at útvega nóg nógv grundøki til tey byggihugaðu. Men nú er broyting við at koma í. Á Norðoyri er ein minni útstykking í gongd við íalt 15 grundøkjum, men eisini aðrastaðni í býnum verður arbeitt við somu ætlanum. Uppi á Fossum er ætlanin snøgt sagt at gera ein heilt nýggjan býarpart á einum øki, ið strekkir seg frá Vágsá og suður ímóti vatnbrunnunum. Umframt bústaðarbygging av ymiskum slagi er ætlanin somuleiðis at ein skal kunna hava bæði handlar, stovnar og annað á hesum staði. **sb.**

## Teir gomlu dystast aftur

**Klaksvík:** Lagt er upp til ein minniligan og ikki sørt sentimentalan dyst, tá KÍ og HB hittast til dyst fríggjakvøldið. Tað verða ikki dagsins manningar sum skulu dystast, men manningarnar sum runnu á leikvøllunum fyri 20 árum síðani. Hesaferð verða liðini mannað við teimum sum spældu við HB og KÍ í 80'unum, og dómari verður eisini ein spælari sum gjørdi um seg sum leikari hetta tíðarskeiðið, nevniliga Baldvin Baldvinsson. Dysturin byrjar kl. 19 í annaðkvøld. **sb.**




*Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur, greiddi millum annað frá um norðurlendsku demokratifrágreiðingarnar*

# Demos sett á stovn í Føroyum

**Fyrst í hesum mánaðinum var skipað fyri almennum fundi í Miðlahúsinum, har eitt føroyskt DEMOS varð sett á stovn. DEMOS er ein norðurlendsk fólkaupplýsingarverkætlan, sum eggjar til orðaskifti og fólksligt virksemi**

FÓLKAUPPLÝSING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

DEMOS er íbirt av norðurlendsku makt- og demokratifrágreiðingunum og norðurlendsku fólkaupplýsingarsiðvenjuni við opnum og beinleiðis samrøðum um útgangsstøði. Spurningarnir, sum settir vórðu til fundin, vóru: Hvussu styrkja vit fólkaupplýsingina í Føroyum? Hvussu kunnu vit skipa viðkomandi útbúgving, eftirútbúgving og annað skeiðsvirksemi fyri fólki við stuttari útbúgving? Hvussu kunnu vit fáa ung við í tað almenna demokratiska orðaskiftið? Hvussu ríka kristindómur og demokrati hvørt annað? Hvussu skulu vit handfara nýggja sosiala ójavnan – vaksandi gjónna millum rík og fátæk?

### Eggja til virkni

Á fundinum í Miðlahúsinum vóru fyrst nøkur upplegg, og síðani varð opið kjak millum tey umleið fýrati fólkini, sum vóru møtt upp. Uppleggini skuldu geva íblástur til at fáa lív í fólkaupplýsingina til tess at eggja eina virkna luttøku í demokratiinum.

Fyrst talaði Johan Steen Johansen, cand. pæd.psyk og rektari á norðurlendska fólkaháskúlanum í Geneve, um evnið: Demokrati og virkin medborgaraskapur í norðurlendskum høpi. Síðani greiddi Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri í Tórshavnar Býráð, frá um demokratiska luttøku í Føroyum. Ingibjørg Berg hevur eitt nú verið uppi í arbeiðinum við norðurlendsku demokratifrágreiðingunum.

Síðsta innleggið stóð Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara úr Mentamálaráðnum, fyri. Hon fortaldi um Mentamálaráðið, fólkaupplýsing og lívlanga læru.

### Nógv ynski

Aftaná innleggini var orðið frítt. Eftir øllum at døma vóru fleiri øki, har fólk kundu hugsað sær skeiðs- og útbúgvingartilboð. Eitt nú vóru ynski sett fram um átak til frama fyri lesiveikar føroyingar, bæði børn og vaksin. Eitt, sum eisini verður undirmett her á landi er eykaundirvísing bæði á fólka- og miðnámskúlaøkinum. Saknur hevur verið í hesum síðani kreppuárini, og er tað sera óheppið, tá hugsað verður um, at krøvini til hægri útbúgvingar herðast í hvørjum.

Harumframt var eisini sett fram ynski um at fáa fleiri almennir fyrilestrar á hægri støði, sum eitt fólkauniversitet. Hesir kundu snúð seg um alt frá demokratii, religión til etisk/filosofisk evni. Eisini vóru pensionistarnir áhugaðir í at fáa evni tikin upp innan teirra áhugaøki.

### Vælvirkandi fólkaræði

Sambært stigtakarunum er DEMOS ein norðurlendskur hugskotsbanki sum sameinir gransking um norðurlendsku makt- og demokratifrágreiðingarnar við pedagogiska og praktiska arbeiðsháttin innan fólkaupplýsingina í Norðurlondum. Sagt verður, at ein virkin medborgaraskapur, fjølbroytni, upplýsing og samrøða eru grundleggjandi hugtøk í einum vælvirkandi fólkaræði. Og at DEMOS er í sjálvum sær ein eggjan til orðaskifti og virksemi.

Á fundinum vóru fýra kontaktfólk vald, sum samskipa arbeiðið víðari á hvør sínum øki. Ætlanin er, at hava eina ráðstevnu um fólkaupplýsing til hestar, sum MMR, NVL (Netværk Voksnes Lærende), Nordplus Voksen og Demos Føroyar 2007 skipa fyri. Stigtakararnir til fundin í Miðlahúsinum vóru Hildur Patursson, hildurp@post.olivant.fo og Holger Arnbjerg, ask@ask.fo, sum til ber at seta seg í samband við.